

B36 hevur í øllum førum hálvt annað bein í steypafinaluni eftir greiða sigurin sunnudagin

Mynd: Álvur Haraldsen

B36-KÍ 4-1 (1-0):

# Havnin fær umboð á ólavsøku

**Øðrvísi fær niðurstøðan neyvan verið, eftir at B36 vann greiðan sigur á KÍ í fyrru hálvfinaluni teirra millum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

KÍ vann dystin á áskoðaraplássunum sunnudagin. Nýstovnaða viðhaldsfelagið gjørdi sítt til, at karmarnir kring fyrru hálvfinaluna millum B36 og KÍ vóru góðir, og við áhaldandi rópum sínum royndu teir alla tíðina at halda høvdið høgt.

Men tað var sum so eisini tað einasta, sum KÍ fekk burtur úr dystinum. Á vøllinum sjálvum var veruleikin ein heilt annar. B36 vann dystin 4-1, og hava harvið meira enn hálvt annað beinið í finaludystinum.

Tað var tíðliga greitt, at setningurin hjá KÍ fyrst og fremst var at binda um heilan fingur. Leikbann og skaðar høvdu við sær, at tað langt í frá var sonevnda ideal-uppstillingin, sum Jan Joensen kundi senda á vøllin, og hetta var ivaleyst eisini ein av orsøkunum til verjukenda útgangsstøðið.

Júst skipanin av verjupartinum er annars nakað, sum KÍ hevur havt sínar trupulleikar við higartil í ár, men tað var so avgjørt ikki nakað, sum tú legði til merkis í Gundadali. Serliga var defensivi parturin av miðvøllinum væl skipaður, soleiðis at B36 miðjan ikki fekk skapt yvirtalsstøður niðaneftir vøllinum, og við trygga Alexander Djordjevic í miðverjuni var stýringin á hesum eisini í lagi.

Við tað at KÍ legði seg somikið aftarliga, gav hetta B36 eina náttúrliga greiða yvirvág í spælinum, men hóast bólturin fyri tað mesta ferðaðist á KÍ, hálvuni, so var tó avmarkað, hvussu nógv teir skaptu av møguleikum. Einstaka ferðirnar var um reppið, at leikarar gjørdust leysir, men leingi sá út til, at tað bara skuldi gerast næstan og so ikki meira.

Man á hálva tímanum kom hol á. John Petersen lyfti bóltin inn um KÍ verjuna, har Julian og Alexander kapprunnu eftir leysa bóltinum. Endin varð at teir báðir fóru bóltandi eftir vøllinum, men Jákup á Borg hevði eisini fylgt við, og einsamallur við málverjanum kundi hann við einum hørðum skoti senda bóltin í kassan.

## Skipanin fór

Eitt var, at KÍ við hesum málinum nú stóð við einum verri útgangsstøði við atliti til finalustríðið. Annað var – og tað hevði alstóran týdning fyri dystin – at Alexander Djordjevic bekklaði fótin somikið illa í støðuni, sum førdi til málið, at tað var ikki hugsingur hjá honum at spæla allan dystin. Haltandi rann hann á vøllinum seinasta korterið undan steðginum, men har var einki at gera.

Hetta noyddi KÍ at fremja nakrar umskipanir í steðginum, og tað var skjótt greitt, at hesar ikki vóru til tað betra. Missurin av Alexander merktist sra væl í verjuni, har stórur partur av stýringini fór av lagi, og ikki minst var tað tungt fyri miðvøllin, at Jan Andreasen nú varð tikin longur aftur á vøllin.

Hinvegin koyrdi B36 bara víðari í sama lag, og tað var eisini heilt skjótt, at málmøguleikarnir komu bóltandi. Heðin av Lakjuni var nær við at opna ballið, tá hann sendi ein reina Carlos upp undir tvørtræið, men ta ferðina sluppu gestirnir tó við skrekkinum.

Tað sluppu teir tó ikki løtu seinni. Við einum Allan Mørkøre og Jákup á Borg høvdu valt sær eitt álop burtur úr fótbóltslærubókini, og eftir at hava tagað vinstra verjuborð hjá KÍ sundur, varð bólturin sendir inn til ein púra leysan John Petersen, og púra kaldur plaseraði hann bóltin í málið.

Og so skrædnaði av álvara. Jákup kundi økja til 3-0, tá hann brádliga gjørdist leysur og slapp framvið bæði verjuleikara og málverja, og alt bendi á, at talan skuldi gerast um sannan stórsigur.

KÍ hevði snøgt sagt einki nevnivert at bjóða uppá frameftir vøllinum, men við fyrsta skipaða álopinum seinastu trý korterini, fingu teir brádliga eina lítla vón. Gott samanspæl á miðjuni endaði við, at Atli Danielsen varð sendur avstað í høgru, og høga innleggið frá honum sveimaði beina leið aftur í handara málhorn, meðan Tróndur Vatnhamar ikki fekk gjørt annað enn bara at hyggja at bóltinum.

Málið gav KÍ eina lítla vón. Bara tað at hava skorað á útivølli kann viga nógv, tá úrslitini skulu leggjast saman, og eina løtu var eisin ilíkt til, at teir nú eisini ætlaðu sær meira enn bert tað eina málið. Spælið varð flutt nakað niðan á vøllin, men veruligir møguleikar varð talan ikki um, og ístaðin hevði B36 hópin av kontramøguleikum. Hesir sóu tó út til at gerast úrslitaleysir, men í seinasta minuttinum av vanligu leiktíðini varð trumfurin settur á.

KÍ verjan var snøgt sagt óskipað, tá B36 kontraði í vinstru. Eitt langt skift til høgru spældi innskifta Berg Midjord fullkomuliga leysan, og uttan at nakar klaksvíkingur var nærhendis, kundi hann halda beina kós móti málinum og skjóta sítt fyrsta mál fyri besta B36-liðið.

Hetta fjórða málið mundi sum so eisini punktera seinastu vónina hjá KÍ um eitt finalupláss á ólavsøku. Gaman í eru framvegis 90 minuttir eftir at spæla, og ein 3-0 sigur kann sjálvandi ikki útilokast, men grundað á dystin sunnudagin er í øllum førum ilt at síggja, hvussu KÍ skal megna hetta. Fyrst og fremst tí styrkismunurin tóktist øgiligur sunnudagin, og hóast eitt nú Ove Nysted og Arnold Joensen verða tøkir til ta tíð, er illa hugsandi, at tað ikki verður B36, sum er annars parturin í ólavsøkufinaluni.

**B36-KÍ 4-1 (1-0):**

1-0 :Jákup á Borg
2-0: John Petersen
3-0: Jákup á Borg
3-1: Atli Danielsen
4-1: Bergur Midjord

B36: Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Fróði Clementsen, Kenneth Jacobsen – Jákup á Borg, Julian Johnsson, Klæmint Matras, Heðin á Lakjuni – Sonni Johansen, John Petersen

KÍ: Carsten Joensen – Alti Danielsen, Sámal Eyðfinn Akursmørk, Alexander Djordjevic, Símun Joensen – Harley Bertholdsen, Allan Joensen, Jan Andreasen, Jan Joensen, Hjalgrím Elttør – Erling Fles



# Elitan sigraði

**Ukrainski stórmeistarin Vassily Ivanchuk, vann sera sannførandi tí eftirhondini tiltiknu Sigeman kappingina, sum í ár bleiv leikt bæði í Svøriki og Danmark**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Seinastu mongu árini hevur 34 ára gamli Vassily Ivanchuk verið ein av fremstu telvarunum í heiminum. Hann trein av álvara inn á talvpallin tá hann vann í Linares í 1991 framanfyri Kasparov. Eitt stutt skifti var Ivanchuk næstfremstur á altjóða ratinglistanum.

Seinasta árið hevur ukrainska stjørnan tó havt nøkur misjøvn úrslit, og er hann í skrivandi løtu nummar tólv á ratinglistanum við 2704 ratingstigum. Serliga eru tað nervar Ivanchuks, sum er størsti múrur hansara, og er hann tí av somu orsøk heldur óstøðugur. Spennandi varð tí at síggja, hvussu hann fór at megna at standa ímóti trýstinum sum tann hægstrataði telvari í Sigeman kappingini.

## Dani gav Ivanchuk mótstøðu

Fyrstu fimm umførini blivu leikt í Malmø, og 6-9. umførini vórðu leikt í Keypmannahavn. Hetta er fyrsta royndin at samansjóða kappingina á hendan hátt. Orsøkin er tann, at Dansk Skak Union í ár bleiv 100 ár. Síðani fyrstu kappingina í 1993, hevur annars verið telvað í Malmø.

Kappingin fevndi um tíggju luttakarar og níggju umfør. Heili níggju stórmeistarar og ein svenskur titluljagstari. Umframt Ivanchuk, kunnu nevnast sterkasti telvari í norðanlondum, Peter Heine Nielsen úr Danmark, eins og Jan Timman, Emil Sutovsky, Curt Hansen og Luke McShane eru stór nøvn.

Tað vísti seg skjótt, at teir einastu, ið nøkunlunda kláraðu at fylgja við Ivanchuk, vórðu Peter Heine og McShane úr Onglandi. Men eftir næstseinasta umfar varð greitt, at kappingin nærum var avgjørd, eftir at Ivanchuk hevði lagt seg eitt stig fremstan. Við at leika ein skjótan javnleik í seinasta umfari ímóti vælkenda Tiger Hillarp-Persson úr Svøriki, vann Ivanchuk loksins oddastríðið.

**Endaliga støðan:**

| | |
|---|---|
| Ivanchuk (2704) | 7,0 av 9 |
| Peter H. Nielsen (2625) | 6,0 |
| Luke McShane (2592) | 5,5 |
| Curt Hansen (2610) | 4,5 |
| Tiger Persson (2474) | 4,5 |
| Sune B. Hansen (2537) | 4,5 |
| Emil Sutovsky (2652) | 4,5 |
| Johnny Hector (2553) | 4,0 |
| Jan Timman (2578) | 4,0 |
| Bengt Lindberg (2392) | 0,5 |

29 ára gamli Peter Heine telvaði væl, og fekk eitt uppiborið annað pláss við ongum tapi og seks stigum. Hann hevur veruliga ment seg seinastu tvey árini og ikki verður tað heilt óvæntað um hann um stutta tíð nærkast topp 10 í heiminum.

McShane, sum undan seinasta umfar lá á øðrum plássi saman við Peter Heina, tapti ímóti einum vælleikandi Curt Hansen í síðsta talvinum. McShane er einans 19 ár, og hevur eftir kappingina beint omanfyri 2600 í rating.

Tiger hevði eina frálíka kapping. Var næstlægst rataður, men vísti av álvara tenn og dirvi. Curt Hansen og Jan Timman bjargaðu teirra æru við at vinna seinastu tvey umførini.

## Talvið hesa vikuna

**Peter Heinie Nielsen (2625) — Vassily Ivanchuk (2704)**
11th Sigeman & Co (6), 05.05.2003

**1.d4 Rif6 2.c4 g6 3.Ric3 d5** (Grunfeldindiska byrjanin) **4.cxd5 Rixd5 5.e4 Rixc3 6.bxc3 Bg7 7.Bc4 c5 8.Rie2 Ric6 9.Be3 0—0 10.0—0 Bd7** (Aðrir møguleikar hjá svørtum eru eitt nú cxd5, Ria5 ella Bg4, sum er vælkent) **11.Rb1 a6 12.dxc5 Ria5 13.Bd3 Fc7 14.f4 Rfd8 15.c6! Fxc6 16.Bb6 Bg4!?** (Sera djarvt telvað av Ivanchuk! Hann letur ein býtismun fyri aktivt spæl. Hin møguleikin var Rdc8 17.Bxa5 Fc5+ 18.Kh1 Fxa5) **17.Bxd8 Rxd8 18.h3 Fc5+ 19.Kh2 Ric4 (Møguliga ein feilur. Fe3 sær gott út) 20.hxg4 (Svart**ur hevur rók minni, men hevur bundið hvítan væl niður. Men nóg væl? **20...Rie3 21.Fd2 Ric4**



**Støðan eftir 21...Ric4**
**22.Fd1** (Ein síðsti møguleiki hjá hvítum er Fe1, sum svartur síðani svarar aftur við Rxe3. Støðan er eftir hetta kanska heldur óklár, men telduforritið Fritz 7 gevur í øllum førum hvítum góðan fyrimun) **22...Rie3 23.Fd2 Ric4 24.Fd1** og javnleikur eftir trýleiksendurtøku regluni

# Tað er framvegis eldur í botninum

**Seks lið kenna av álvara hóttanina av niðurflyting undir sær, og millum hesi eru stórfeløgini í Ålborg og Århus**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin 22. juni verður greitt, hvør hevur vunnið danska meistaraskapin í fótbólti, hvør skal umboða Danmark í Europa Cup kappingunum, og hvørji tey bæði feløgini vera, sum skulu tungu leiðina niður í næstbestu deildina.

At tað verður FCK ella Brøndby, sum fer at taka ímóti DM steypinum, er eingin ivi um. Tað skal vilja heilt illa til hjá Farum, um teir í fyrstu royndini nakrantíð í bestu deildini ikki fara at vinna bronsukrónurnar. Um teir ikki fara at megna tað, so er í løtuni størsta hóttanin at finna í FCM, men hon er ikki serliga stór.

Í botninum er spenningurin rættuliga stórur. Køge er aftast við 27 stigum. Teir eru, nú tað eru seks umfør eftir at spæla, fimm stig frá bjargingar plássinum, og tað er ilt at fáa eyga á, hvussu teir skulu sleppa undan niðurflyting. Men Køge hevur ikki heilt slept endanum. Sunnudagin høvdu teir vitjan av FCM, sum er nummar fýra. Dysturin endaði 1–1. Undan hesum umfarinum hevði Køge tapt fimm ferðir á rað.

Hóast teir fingu 1–1 í Brøndby, so eru teir í AGF framvegis næstaftast, men teir hava gott mót um, at tað skal eydnast næststørsta býnum í Danmark at varðveita liðið hjá sær í superliguni.

## Kostar 20 milliónir

At tað skal eydnast OB úr triði størsta býnum at varðveita sítt lið í bestu deildini er tað lítil ivi um. Verri stendur tað til hjá AaB, sum er úr fjórði størsta býnum í Danmark. Ålborgensarnir vóru sunnudagin í Odense, og teir vórðu sendir til hús við 3–1 tapi. At tað gongur av skriðuni hjá AaB sást eitt nú í, at teir gjørdu sjálvmál, tá ið OB skoraði til 1–0, og eisini tá ið teir í OB øktu til 3–0, hjálpti ein fótur hjá AaB til.

Í donsku pressuni verður nógv skrivað og tosað um, at venjarin hjá AaB kanska fer at fáa sekkin í hesi vikuni. Stjórin í felagnum rann ikki undan veruleikanum, tá ið hann eftir tapið í Odense tók bestikk av støðuni. Um AaB ikki megnar at halda seg í superliguni, so fer tað at kosta felagnum tjúgu milliónir krónur, var metingin hjá honum.

Viborg styrkti um sína støðu, tá ið teir á heimavølli vunnu 3–0 á AB, sum síðsta tíman stríddist við tíggju monnum. Svenski Viborg venjarin, Benny Lennartsson, rósti sínum spælarum og staðfesti samstundis, at enn eru ikki – so plagar maðurin at taka til – allar súðir syftar.

Silkebog er triði aftast, og teir iðraðu seg. Í 2. hálvleiki løgdu teir seg framum 2–0 ímóti Esbjerg, men Esbjerg kom afturíaftur og javnaði. Serliga meint mundi tað kennast í Silkeborg, at Steffen Hansen, sum Silkeborg síðsta vetur ikki metti at vera nóg góðan til teirra lið, skoraði seinna málið hjá Esbjerg.

# Heðin Weihe »føroyameistari« í golf

**Í finaludystinum fekk Heðin hevnd fyri tapið móti Hans Thomassen, eftir at hesin seinni hevði funnið holkappingina mikudagin**

GOLF
*tíðindaskriv*

Hetta vikuskiftið varð kappast um klubbmeistaraheitið í Tórshavnar Golfklubba. Við tað at tað bert er tann eini golfklubbin í Føroyum, kann hetta meistaraheitið eisini metast sum óalment føroyameistaraheiti í golf.

Kappast var yvir 36 hol í tveir dagar, leygardagin og sunnudagin. Og tað eydnaðist Heðini Weihe at endurvinna meistaraheitið. Heðin brúkti 169 sløg upp á tey 36 holini, 81 sløg leygardagin og 88 sløg sunnudagin. Nummar tvey gjørdist Hans Thomasen, ið einans hevur spælt golf í eitt hálvt ár, við 179 sløgum, meðan formaður golfklubbans, Harald Eirikstoft, gjørdist nummar trý við 191 sløgum.

Nummar fýra var René Dahl Olsen, nr. 5 Jón Niclasen, nr. 6 Julius Johannesen, nr. 7 Regin Andreasen og nr. 8 gjørdist Janus Norðberg.

Við meistaraheitinum fekk Heðin Weihe svara aftur fyri tapið móti Hans Thomasen í sokallaðu holkappingini, ið er ein kapping eftir cup-skipanini. Hans og Heðin spældu finaluna mikukvøldið, og tá vann Hans 3-2, tað vil siga, at hann hevði vunnið trý hol fleiri enn Heðin, tá tvey vóru eftir at spæla.

Hjá kvinnunum varð klubbmeistaraheitið spælt seinasta vikuskifti, og her vann Sigrun Samuelsen framman fyri Juliannu Klett. Sokallaðu Tinganeskappingina vann Jette Eirikstoft.

Kappast hevur eisini verið um sokallaða Smyril Line Cup. Ta kapping-ina vann Rói Christiansen.

Tórshavnar Golfklubbi gevst nú at spæla golf á breytini á Vatnaskørðum, tí nú skal grasið hjá Hoyvíksbóndanum hava frið at vaksa. Spælast kann aftur, tá bóndin hevur sligið, væntandi um ólavsøkumundið.